# Ingeborg Vinther ómetaliga vónbrotin av javnaðarflokkinum

**Tað sum gongur fyri seg í føroyskum politikki í løtuni,er heilt óhugnaligt fyri verkafólkið, sigur Ingeborg Vinther**

LANDSFUNDUR HJÁ JAVNAÐARFLOKKINUM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tekur javnaðarflokkurin ikki annað skinn um bak, ætli eg mær í hvussu so er ikki at stuðla flokkinum á næsta vali og eg ætli mær heldur ikki at gera nakað sum helst fyri at hann skal koma í samgongu aftur.

Tað ger Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, púra greitt í kvøld, nú landsfundur javnaðarfloksins verður settur á Svangaskarði um eina løtu.

Hóast hon ikki er limur í nøkrum flokki, dylir hon ikki fyri, at hon hevur stuðlað javnaðarflokkinum, men tað verður ikki aftur, uttan so, at flokkurin broytir kós.

Hon sigur, at í fullveldissamgonguni var tað heilt týðiligt, at tað var fólkaflokkurin, sum spældi fyrstiviolin og tað er akkurát tað sama í hesi samgonguni.

Hon hugsar um tann skatta- og avgjaldspolitikk, sum verður førdur, har fleiri og fleiri avgjøld ella brúkaragjøld verða løgd á fólk og har skattalætti verður í mesta mun latin til tey vælbjargaðu.

### Vit skulu gjalda-politikarar skulu valda

Men tað fúlasta dømi av øllum er barnsburðargrunnurin, heldur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.

Tað verður sagt, at barnsburðarskipanin skal leggjast undir partarnar á arbeiðsmarknaðinum.



*– Tekur javnaðarflokkurin ikki annað skinn um bak, ætlar Ingeborg Vinther sær ikki at stuðla honum á næsta løgtingsvali*

Men hetta heldur Ingeborg Vinter er at kasta torvmold í eyguni á fólki.

–Veruliga ætlanin hjá samgonguni er, at løntakarar og vinnan skulu betala meir í barnsburðarskipanina og tað eri eg hart ímóti, tí vit hava nóg mikið av avgjøldum frammanundan.

– Men tað verður framvegis politiska skipanin, sum skal varðveita alt valdið á henni. So grov er samgongan ímóti løntakarunum.

IngeborgVinther sigur, at hon hevur varhugan av, at ALS verður tað næsta, sum politikararnir ætla sær at fáa fingrarnar í.

– Politiskir myndugleikar hava ilt av, at tað eru partarnir á Arbeiðsmarknaðinum, sum hava Als undir sær og sum betala til ALS og sum hava valdið á ALS.

Tað, sum sipað verður til, er, at av tí, at ALS er undir arbeiðsmarknaðinum, er skipanin eisini uttanfyri fíggjarlógina. Men ávísir politikarar tvíhalda um, at tað er bara Løgtingið, sum hevur rætt til at krevja skatt, hóast fleiri løgfrøðingar siga tað øvugta, nevniliga, at gjaldið til ALS er ikki skattur, men eitt gjald til ein arbeiðsloysisgrunn.

Ingeborg Vinther sigur, at tey hava roynt at fáa politiska myndugleikan at vátta, at tað eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum eiga ALS.

– Men eina slíka váttan er ómøgulig at fáa, sigur Ingeborg Vinther.

### Lurta ikki eftir

Hon sigur, at samgongan hevur ferð eftir ferð víst, at hon lurtar ikki eftir pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

– Vit hava mangan sent samgonguni brøv um ymisk viðurskifti, men tað verður ikki lurtað eftir okkum og tað er sjáldan, at vit fáa so mikið sum eitt svar.

Og so er ikki um at tala allar politisku uppíleggingarnar í teir arbeiðssteðgir, sum hava verið.

Hon ásannar kortini, at samhaldsfasti er hækkaður og tað fegnast hon um.

– Men tað var dýrt, tí tað kostaði ein skattalætta upp á 105 milliónir, sum í mesta mun fer til tey vælbjargaðu.

Ingeborg Vinther sigur, at tað er heilt ótrúligt, sum gongur fyri seg í politikki og javnaðarflokkurin hevur tíverri verið eitt stórt vónbrot hjá fakfelagsrørsluni.

– Tekur hann ikki betri partar fyri seg, verður tað ein syndraður flokkur, sum fer til løgtingsval næstu ferð og tað fer ikki at spæla væl av, tí kemur ikki broyting í, er bara at siga takk og farvæl, ongantíð ov skjótt, sigur Ingeborg Vinther.

– So dýr verður hendan samgongan fyri flokkin.

Hon sigur sostatt, at skal flokkurin sleppa snikkaleysur burturúr einum komandi løgtingsvali, eigur hann at finna sínar røtur aftur, ella má hann pakka í sekkin.– Við hetta lag, verður prísurin fyri samgonguna ov høgur hjá flokkinum at gjalda, sigur Ingeborg Vinther.

# a avbjóðing verður at fáa at skilja nýggja veruleikan



*– Hetta farna árið eru Føroyar traðkaðar upp á altjóða politiska pallin og tað fari eg at greiða veljaranum frá á landsfundinum hetta vikuskiftið, sigur løgmaður*

serligur, tí hetta verður fyrsti landsfundurin eftir at javnaðarflokkurin hevur sitið í samgongu í eitt heilt ár og at úrslitið av førda politikkinum nú eru farin at síggjast av álvara.

– Veruleikin í andstøðu og í samgongu er heilt hvør sín. Í andstøðu kanst tú alla tíðina verða fullkomiliga trúgvur mótvegis tínum hugsjónum.

– Men í samgongu mást tú alla tíðina samstarva um at finna semjur og tað skulu støður takast, sum vit eru alt annað enn fegin fyri.

– Tað skal lorast onkustaðni fyri at kunna taka inn onkra aðrastaðni og tí kann tað onkuntíð verða trupult hjá veljaranum at síggja tað hugsjónarliga støðið aftur í tí førda politikkinum.

– Eg skilji væl teir veljarar, sum eru ørkymlaðir. Men fyri at fáa ávirkan, mugu vit í samgongu, so hóast samgongustarvið er merkt av, at vit samstarva við aðrar flokkar, og gera ótrúliga nógvar semjur, hava vit so als onga ávirkan yvirhøvur, táið vit sita í andstøðu.

– Sjálvandi byggir flokkurin á eitt grundstøði, men tað er neyðugt alla tíðina at flyta seg, fyri at fylgja við broytingum í tíðini. Og eg haldi at tað er altíð rætt at royna at koma í eina samgongu, har flokkurin fær ávirkan, heldur at ganga eina oyðimarkargongd í andstøðu.

Sostatt verður tað okkara uppgáva at greiða veljaranum so væl frá støðuni, at hann skilir hana og góðtekur hana.

Løgmaður vísir serliga á, at í hesi samgonguni er javnaðarflokkurin saman við tveimum borgarligum flokkum og tað slepst ikki undan at tað eisini merkir politikkin.

Eitt, sum hann hugsar um, er skattalættin, tí fólk kunnu av røttum spyrja, hví flokkurin góðtekur ein skattalætta, tá ið tað annars ikki eru ráð til tað stóra.

– Í hesum sambandi hevur tað týdning at staðfesta, at afturfyri skattalættan eydnaðist tað okkum at styrkja munandi um samhaldsfasta eftirlønargrunnin og tað hevur alstóran týdning fyri tey lágløntu. Júst hesi bæði eru góð dømi um semjur, sum tað er neyðugt at gera

– Á landsfundinum fari eg at brúka tíð uppá at greiða veljaranum frá, hví eg haldi at tað er týdningarmikið at vit eru í samgongu og hava ávirkan heldur enn at sita í andstøðu og lata onnur føra politikk yvir høvdinum á okkum, hóast samgonguleikluturin kann kosta hugsjónarliga í summum førum.

Annars heldur formaður javnaðarfloksins ikki at hann kennir atfinningarnar frá fakfelagsleiðarunum aftur, sum eru prentaðar aðrastaðni í blaðnum.

– Eg kann ikki sameina meg við tey sjónarmiðini. Eg skal taka ábyrgdina á meg fyri at vit hava gingið fakfeløgunum ov nær í ávísum førum. Men tað er eisini neyðugt, at vit finna eitt smidligari samstarv við arbeiðsmarknaðin, so at vit saman kunnu taka framtíðar avbjóðingar á okkum og fáa ein tryggari arbeiðsmarknað og eitt tryggari samfelag.

Kortini heldur løgmaður, at tað er avgjørt ein bági, at løntakarafeløgini standa so spjadd.

– Tað hevði hjálpt munandi um løntakararnir kundu savnað seg um eina felags rødd og at tað hevði borið til at viðgjørt ymisk viðurskifti, eisini í fríðartíð, so at tað ikki altíð er so, at vit bara samskifta við eini hóttan um arbeiðssteðg hangandi yvir høvdinum og pistólini fyri pannuni.

### Samdur um at býta virðini

Nú skerst ikki burtur, at javnaðarflokkarnir í hinum norðurlondum hava havt torført við at fóta sær í einum broytiligum heimi. Ymsir vengur eru í opnum stríði ímóti hvørjum øðrum og tað verður gjørt til eitt stríð um at varðveita, gomlu vinstra-linjuna ella um at søkja inn ímóti miðjuni. Er javnaðarflokkurin í Føroyum samdir um hesi viðurskifti?

– Javnaðarflokkurin í Føroyum hevur tann øvugta trupulleikan sum tjóðveldisflokkurin hevur. Tjóðveldisfólk eru samd um fullveldið, men eru annars ósamd um tað mesta av øllum hinum, tí flokkurin hýsir fólki av vinstraveinginum yvir í høgraveingin.

Uttan at tosa um at liggja til vinstru ella inn ímóti miðjuni, sigur løgmaður, at Javnaðarflokkurin er púra samdur um, hvussu virðini í samfelagnum skulu býtast og um at tryggja vælferðarskipanirnar. Men um ríkisrættarligu viðurskiftini eru javnaðarfólk líka ósamd sum tjóðveldisflokkurin er fíggjarpolitikkin og onnur viðurskifti.

Í hesum sambandi er løgmaður ógvuliga spentur at hoyra hvørja støðu veljarin á landsfundinum hevur til ymisk mál, eitt nú einskiljingar, sum eru nokk so fremmandar fyri flokkin.

Sjálvur fer hann at greiða fundarfólkinum frá, hví hann heldur at tað er rætt at vera við og royna at ávirka einskiljingar, heldur enn at stinga høvdið í sandin og lata onnur fremja einskiljingarnar, heilt uttanum javnaðarflokkin.

Annars ásannar løgmaður, at á hansara egnu málsøkjum í landsstýrinum er rættiliga nógv hent.

– Føroyar eru rættiliga traðkaðar upp á altjóða, politiska pallin og tað fari eg eisini at greiða frá.

Í hesum sambandi hugsar løgmaður um Fámjinsskjalið, um yvirlýsinginina um sjálvsavgerðarrættin, um yvirtøkulógina, um avtaluna um uttanríkispolitisku heimildirnar, um Íslandssáttmálin og um kumuleringsavtalan og samskiftið við ES annars. Men hann hugsar eisini um flúgving, útbúgving og gransking og svartkjaftin.

– Eg fari at greiða frá teimum møguleikum, sum hetta gevur og um møguleikarnar fyri samstarvi við EFTA.

Løgmaður sigur eisini, at føroyingar eru nú farin at taka virknan luft í altjóða hjálpararbeiði og menningararbeiði.

– Alt hetta altjóða virkisøkið er áhugavert og gevur politikkinum eitt annað innihald.

Løgmaður fer somuleiðis at greiða frá 10 ára menningarætlanini og ikki minst hví hann heldur, at tað er neyðugt fyri javnaðarflokkin at hava eina menningarætlan.